Støður, EM-undankappingin

Bólkur 1

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Frakland	6	6	-	0	-	0	24	2	22	18
2 Slovenia	6	4	-	1	-	1	13	8	5	13
3 Ísrael	6	2	-	2	-	2	7	6	1	8
4 Kypros	7	2	-	1	-	4	7	16	-9	7
5 Malta	7	0	-	0	-	7	3	22	-19	0

Bólkur 2

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Rumenia	7	4	-	1	-	2	19	7	12	13
2 Danmark	6	4	-	1	-	1	12	6	6	13
3 Noreg	7	3	-	2	-	2	8	5	3	11
4 Bosnia Hersegovina	6	3	-	0	-	3	5	7	-2	9
5 Luksemb.	6	0	-	0	-	6	0	19	-19	0

Bólkur 3

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Kekkia	6	5	-	1	-	0	17	2	15	16
2 Holland	6	5	-	1	-	0	14	3	11	16
3 Eysturríki	7	3	-	0	-	4	10	11	-1	9
4 Moldova	6	1	-	0	-	5	3	13	-10	3
5 Hvíta-russland	7	1	-	0	-	6	3	18	-15	3

Bólkur 4

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Svøríki	6	4	-	2	-	0	17	2	15	14
2 Ungarn	6	3	-	2	-	1	13	4	9	11
3 Póland	6	3	-	1	-	2	9	4	5	10
4 Letland	6	3	-	1	-	2	6	5	1	10
5 San Marino	8	0	-	0	-	8	0	30	-30	0

Bólkur 5

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Ísland	7	4	-	1	-	2	11	6	5	13
2 Týskland	6	3	-	3	-	0	8	3	5	12
3 Skotland	6	3	-	2	-	1	10	6	4	11
4 Litava	6	2	-	1	-	3	4	9	-5	7
5 Føroyar	7	0	-	1	-	6	6	15	-9	1

Bólkur 6

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Grikka-land	7	5	-	0	-	2	7	4	3	15
2 Spania	6	3	-	2	-	1	10	3	7	11
3 Ukraina	7	2	-	4	-	1	10	8	2	10
4 Armenia	6	1	-	1	-	4	6	12	-6	4
5 Norður Írland	6	0	-	3	-	3	0	6	-6	3

Bólkur 7

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Turka-land	7	6	-	0	-	1	17	5	12	18
2 Ongland	6	5	-	1	-	0	12	5	7	16
3 Slovakia	6	2	-	0	-	4	8	8	0	6
4 Makedonia	7	1	-	2	-	4	10	13	-3	5
5 Likten-stein	6	0	-	1	-	5	2	18	-16	1

Bólkur 8

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Bulgaria	6	4	-	2	-	0	10	3	7	14
2 Kroatia	6	4	-	1	-	1	10	2	8	13
3 Belgia	6	3	-	1	-	2	7	8	-1	10
4 Estland	7	2	-	2	-	3	4	4	0	8
5 Andorra	7	0	-	0	-	7	1	15	-14	0

Bólkur 9

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Italia	6	4	-	1	-	1	12	3	9	13
2 Wales	6	4	-	0	-	2	10	6	4	12
3 Finnland	7	3	-	0	-	4	8	9	-1	9
4 Serbia & Montenegro	6	2	-	2	-	2	7	8	-1	8
5 Aserbadjan	7	1	-	1	-	5	5	16	-11	4

Bólkur 10

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Sveis	6	3	-	3	-	0	12	7	5	12
2 Írland	7	3	-	2	-	2	10	9	1	11
3 Russland	6	2	-	2	-	2	12	10	2	8
4 Georgia	6	2	-	1	-	3	6	8	-2	7
5 Albania	7	1	-	2	-	4	8	14	-6	5

Møguleiki fyri fleiri Norðurlondum

Noreg hongur í klønum tráði, meðan Svoríki og Danmark liggja væl fyri, og Ísland hevur framvegis møguleika fyri fyrstu ferð at sleppa upp í part í endaspæli

EM UNDAN-KAPPINGIN
Jóannes Hansen

Tað gerst alt meiri greitt, hvørjar tær sekstan fótbóltstjóðirnar fara at verða, sum næsta summar skulu dystast um EM heitið í Portugal.

Hugaligt er at staðfesta, at tað framvegis eru góðir møguleikar fyri, at tvey og kanska trý Norðurlond sleppa upp í part. Danmark spældi ikki leygardagin. Men eftir at Noreg tapti 1–0 í Bosnia–Hersegovina hava danir, sum teir sjálvir siga, tveir matchbóltar. Í annaðkvøld skulu teir spæla í Parkini ímóti Rumenia. Um teir vinna tann dystin, so hevur Danmark tryggjað sær rættin at luttaka í endaspælinum. Um tað verður javnleikur í annaðkvøld, ella um Danmark verður fyri teprum tapi, so fara teir framvegis at hava møguleikan at tryggja sær beinleiðis luttøku, tá ið teir í síðsta umfarinum á útivølli skulu spæla ímóti Bosnina–Hersegovina. Um tað stendur á jøvnum í stigum eru tað innanhýsis uppgerðirnar, sum eru avgerandi, áðrenn hugt verður eftir málmuninum. Danmark vann 5–2 í Rumenia.

Eftir tapið í Bosnia eru møguleikarnir hjá Noregi mest sum burtur. Eisini at røkka næstfremsta plássinum, sum ber rætt til endaspæl millum tvey lond við sær.

Í okkara bólki megnaði Ísland málleysan javnleik á heimavølli ímóti Týsklandi. Hetta verður mett sum sera gott úrslit, men tað er neyvan nóg mikið, um Ísland ætlar sær at vinna bólkin. Ísland skal í síðstu uppgerðini spæla í Týsklandi, og tá verður neyðugt hjá grannunum fyri vestan at vinna, um Ísland skal vinna bólkin. Tað verður rættuliga torført.

Sannlíkt er tað, at Týskland, sum í annaðvkvøld fer at fáa vitjan av Skotlandi, fer at vinna bólkin, og at Skotland og Ísland fara at kappast um næstfremsta plássið og harvið rættin til endaspæl um eitt pláss.

Svoríki var sannførandi á Nya Ullevi í Göteborg, hare teir vunnu 5–0 á San Marino. Harvið liggur Svoríki rættuliga væl fyri at sleppa upp í part í endaspælinum.

Finnland vann 2–1 í Aserbadjan, men møguleikin hjá teimum er lítil at røkka fremsta ella næstfremsta plássinum.

Stóru fótbóltstjóðirnar Frakland og Italia hava mest sum tryggjað sær pláss í endaspælinum. Ongland vann 2–1 í Makedonia, og teir skulu í Istanbul um ein mánað spæla avgerandi dystin um fremsta plássið ímóti Turkalandi. Grikkaland liggur betri fyri enn Spania, sum kortini man fara at sleppa upp í part, tá ið tað fer at ganga fyri seg í grannatjóðini á Iberisku hálvoynni.

Holland og Kekkia stríðast um fremsta plássið, men tey munnu ivaleyst eisini bæði fara at vera uppií, tá ið tað fer at galda.

Nú verður síðsta hondin løgd á

Landsliðið fór í gjár undir fyrireikingarnar til síðstu uppgávuna í hesum undankappingarumfarinm, sum verður á skránni í annaðkvøld

LANDSLIÐIÐ
Jóannes Hansen

Fyrrapartin í gjár vóru landsliðsspælararnir aftur í sving. Eftir heimkomuna seint leygarkvøldið og fríløtu sunnudagin fóru teir í gjár undir fyrireikingarnar til avbjóðingina ímóti Litava. Tann dysturin verður spældur á Svangaskarði mikukvøldið klokkan 18.30.

Litaviska landsliðið skuldi koma til landið í gjár. Teir búgva í høvuðsstaðnum, og í kvøld fara teir at venja á Svangaskarði.

Føroyska liðið vandi á vøllinum við Løkin í Runavík fyrrapartin í gjár. Nógva avfallið sunnudagin hevði við sær, at grasvøllurin á Toftum varð mettur at vera so mikið bleytur, at tað ikki varð hildið ráðiligt at venja á honum.

Føroyska liðið skuldi ikki venja í gjárkvøldið. Tá var ætlanin, at teir skuldu mýkja vøddarnar í svimjihylinum.

Nítjan spælarar

Allir spælararnir, sum vóru í Skotlandi leygardagin, vóru á vøllinum í sambandi við venjingina fyrrapartin í gjár. Súni Olsen var komin seg heilt yvir skaðan, sum helt honum uttanfyri leygardagin. Um ikki okkurt heilt óvæntað tekur seg upp, so verður hann aftur á vinstra vongverjanum í annaðkvøld.

Óli Johannesen gavst at venja rættuliga tíðliga. Tað var okkurt smávegis, sum fysioterapeuturin tók sær av, men talan var ikki um nakað, sum fer at halda metmanninum uttanfyri í annaðkvøld. Fyri Óla luttók Henrik Larsen sjálvur í venjingini. Lars Høgh hevði teir báðar málverjarnar, Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen, undir hond.

Heilsustoðan var so mikið góð, at læknin, Jens Pauli Marstein, og liðleiðararnir báðir, Birgir Hansen og Kári Nielsen, runnu eitt umfarið fyri og annað eftir kring vøllin, meðan Jógvan Martin Olsen stóð á miðjum vølli og hirsaði við spælarunum.

Umframt teir átjan, sum vóru í Skotlandi, so var Christian Høgni Jacobsen við í venjingini í gjár. Hann var leikbannaður leygardagin. Tað er bara møguleiki at hava átjan nøvn á dómaraseðlinum. Eingin spælari er sendur til hús enn, og eingin verður sendur til hús undan avbjóðingini í annaðkvøld. Tað verður ikki greitt fyrrenn í morgin, hvør spælarin verður, sum verður settur millum áskoðararnar.

EM-úrslit

Bókur 1
Frakland-Kypros 5-0 (3-0)
Slovenia-Ísrael 3-1 (2-0)

Bólkur 2
Rumenia-Luksemburg 4-0 (2-0)
Bosnia-Hersegovina-Noreg 1-0 (0-0)

Bólkur 3
Holland-Eysturríki 3-1 (1-1)
Hvítarussland-Kekkia 1-3 (1-1)

Bólkur 4
Svoríki-San Marino 5-0 (1-0)
Letland-Póland 0-2 (0-2)

Bólkur 5
Skotland-Føroyar 3-1 (2-1)
Ísland-Týskland 0-0

Bólkur 6
Ukraina-Norðurírland 0-0
Armenia-Grikkaland 0-1 (0-1)

Bólkur 7
Macedonia-Ongland 1-2 (1-0)
Liktenstein-Turkaland 0-3 (0-2)

Bólkur 8
Bulgaria-Estland 2-0 (1-0)
Andorra-Kroatia 0-3 (0-2)

Bólkur 9
Italia-Wales 4-0 (0-0)
Aserbadjan-Finnland 1-2 (0-0)

Bólkur 10
Írland-Russland 1-1 (1-1)
Georgia-Albania 3-0 (3-0)

B68-AB 1-2 (-1):

Tað gekk ikki triðju ferð

2. DEILD
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Tað var ikki alle gode gange tre hjá B68. Tvær tær seinastu ferðirnar høvdu teir fingið fult á heimavølli – ímóti ÍF og KÍ. Harvið var vónin um, at tað skuldi eydnast at bjarga liðnum undan beinleiðis niðurflyting kveikt.

Sunnukvøldið var AB á Svangaskarði, og argjamenn fóru suður aftur við øllum stigunum. Teir vunnu 2–1.

Fyrsta bríkslið hjá Jóannesi Mikkelsen úr Gøtu var klokkan 18, og tað var rættuliga illfýsið ta løtuna, sum spælararnir tókust. Frammanundan vóru líkindini hampulig, og áðrenn spælararnir vóru komnir úr ítróttarhúsinum eftir dystarenda, var tað aftur stilli.

B68 hevði fríska lotið undan í 1. hálvleiki. Aftasti verjumaðurin, Mannbjørn Nesá, legði heimaliðið framum við dundrandi langskoti, sum Magni Thomsen í AB málinum ikki fekk fatur á. Hóast málið vísti B68 monnunum, at tað loysti seg at royna úti frá og undan vindinum, so gjørdu teir ikki nógv av hesum.

Heimaliðið legði seg framum eftir 20 minuttir, og tríggjar minuttir seinni var aftur javnt. Pætur Dam Jacobsen fór ígjøgnum í vinstru, beinini vóru – tað var ikki neyðugt – tikin undan honum, og Eyðun Samuelsen var tryggur úr ellivu metrum.

AB fekk sigursmálið, tá ið seinna umfarið var tríggjar minuttir gamalt. Skjóti miðvallarin í vinstru, Pætur Dam Jacobsen, royndi seg við dundrandi skoti úr í minsta lagi 40 metrum. Ferðin undan vindinum var øgilig, og bólturin brast í tvørtræið og so niður í vøllin innanfyri málstrikuna. Talan var um eitt framúr vakurt mál.

AB hevði eina rúgvu av málmøguleikum í 2. hálvleiki, men teir fingu ikki fleiri mál. Tað syrgdi Mortan Hansen í B68 málinum fyri. Hann bjargaði kanska einar tíggju ferðir framúr væl, tá ið mótstøðumenninir vóru einsamallir ígjøgnum.

B68 royndi at lyfta seg uppaftur á javnt. Teir høvdu ikki upplagdar møguleikar, men einar tríggjar hornasparksstøður, og onkrar vitjanir í AB brotsteiginum høvdu við sær, at tað var spenningur í alla tíðina. Men AB fekk øll stigini, og harvið øktist møguleikin at vinna bronsukrónur fyrsta árið, teir royna seg í næstbestu deildini. Dreymurin um bara eitt ár í næstbestu deildini, áðrenn uppflyting í bestu deildina verður ikki veruleiki.

Hjá B68 versnaði støðan í botninum, nú bæði LÍF og B71 fingu fult.

B68–AB 1–2 (1–1)
1–0: Mannbjørn Nesá 20.
1–1: Eyðun Samuelsen br 23.
1–2: Pætur Dam Jacobsen 48.
Dómari: Jóannes Mikkelsen

Sumba–LÍF 2–3 (2–1):

Magnus á Dalbø dagsins maður

2. DEILD
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Leirvíkingar vóru í góðum hýri, tá ið teir sunnukvøldið komu norður um Suðuroyarfjørð. At spæla í Sumba kennist torført hjá øllum. Eisini hjá LÍF, sum kortini tey seinastu árini hevur havt gott tak á har suðuri. Í fyrraárið megnaðu teir javnleik, í fjør vunnu teir, og aftur hesa ferð fekk LÍF fult.

Men tað sá einki út fyrstu løtuna. Tá ið tjúgu minuttir vóru farnir, var heimaliðið frammanfyri 2–0. René Thomsen setti hol á eftir hornasparksinnlegg úr høgru frá Robert Cieslewicz, og Karl Lisberg økti til 2–0, eftir at afturlegging til Allan Joensen í LÍF málinum ikki hevði havt nóg nógva ferð.

Bárður Heinason minkaði um munin, eftir at hann í høgru hevði sneitt framvið bakkinum og sent flatt í handara síðunetið.

Dygst undan steðginum hevði LÍF gyltan møguleika at javna. Tomek Resel varð feldur og fekk brotsspark. Hann royndi sjálvur úr ellivu metrum, men málverjin bjargaði til horna, og harvið varð enn eina ferð staðfest, at tað ikki er serliga gott hugskot, at sami maður, sum fær brotsspark, roynir at fáa nyttu burturúr.

Ein lítil løta var farin av seinna umfarinum, tá ið LÍF setti gøtumannin Magnus á Dalbø á vøllin. Tað skuldi vísa seg at vera gott hugskot. Hann hevði bara verið lítla løtu uppií, tá ið hann á tímanum fekk fatur á kiksaðum málsparki og skoraði, og løtu seinni skoraði hann fyri LÍF sera týdningarmikla sigursmálið. Petur Sjúrðarberg spældi hann leysan av miðjuni, Magnus fór sjálvur, og hann var tryggur.

Óvæntaða tapið hevur við sær, at Sumba mest sum hevur mist allar møguleikar at vera við í telvingini um uppflyting. Teir duttu eisini av bronsuplássinum.

Hjá LÍF var talan um sera týdningarmikla sigursmálið. Ikki minst eftir tepra tapið á heimavølli ímóti B71, sum skoraði sigursmálið í síðstu sekundunum. Leirvíkingarnir stríddust sera væl hesa ferð. Fyrr í summar hava teir ofta havt hug til at kanalisera mótgongdina í innanhýsis illneiting, men hesa ferð var einki av tí slagnum. Teir stríddust ein fyri allar og allir fyri ein. 17 ára gamli Sølvi Vatnhamar var aftasti maður. Vatnhamar er kent fótbóltseftirnavn í Leirvík, og ungi maðurin stóð seg væl í fyrstu royndini á árinum.

Sumba–LÍF 2–3 (2–1)
1–0: René Thomsen
2–0: Karl Lisberg
2–1: Bárður Heinason
2–2: Magnus á Dalbø
2–3: Magnus á Dalbø

ÍF–KÍ 4–1 (2–1):

Gott lag í Fuglafirði

2. DEILD
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Fótbóltslagið er gott í Fuglafirði. ÍF er á odda í 2. deild, og tað skal vilja heilt illa til, um Sigfríður Clementsen og hansara menn ikki fara at vinna plássið í fremstu deildini aftur, sum ÍF misti fyri fýra árum síðani. Nýggi vøllurin er fínur, og áskoðarafjøldin sunnudagin boðaði frá, at ÍF hevur dygga undirtøku.

Oddasessurin hjá ÍF er so mikið sannførandi, at teir eiga so spakuliga at fara undir fyrireikingarnar til næsta kappingarár. Avrikini í ár og aftur sunnudagin hava víst, at tað verður neyðugt við tilgongd av lyklaspælarum, um talan ikki bara skal verða um stuttan visitt í bestu deildini.

Ímóti einki serligt mannaða KÍ var eingin ivi um, at ÍF var væl betra liðið. Men fuglfirðingar vóru kløkkir onkra ferðina í fyrra umfarinum, tá ið verjuspælið ikki var meiri enn passaligt. Helmar Lassen var púra leysur við Fróða Poulsen, sum bjargaði, og ta einu ferðina vóru Olgar Danielsen, Helmar Lassen og David Bertholdsen frammanfyri málinum við einum verjuspælara og málverjanum, men skotið fór væl omanfyri.

ÍF legði seg skjótt framum við tveimum málum. Í fyrra førinum varð Ken Bærentsen spældur leysur við John Williami Joensen, og í seinna førinum var tað Hanus Eliasen, sum sera hegnisliga við høvdinum umsetti innleggið úr vinstru frá Ken Bærentsen. Bólturin varð dirigeraður heilt upp undir handaru samankomingina.

Helmar Lassen minkaði um munin stutt undan hvíldini, tá ið hann gjørdist púra leysur.

Í 2. hálvleiki skoraði Hanus Eliasen, sum støðugt var vandamikil, til 3–1, tá ið hann saman við liðfelaga kom einsamallur ímóti KÍ málverjanum. Miðvallarin Høgni Zachariassen staðfesti 4–1 sigurin við besta málinum. Hann tveitti seg fram og drønstútaði hart innlegg úr høgru upp í hornið.

Hýrurin var góður á fuglfirðingum. Tað er framvegis møguleiki fyri, at TB kann fáa teir aftur. Leygardagin skal ÍF suður á Sevmýri. Um tað eydnast teimum at koma norður um aftur við í hvussu so er einum stigi, so fer at síggja heilt gott út. Um teir einki fáa, so fer avgerðin framvegis at vera í teirra hondum, men tá fer endaspurturin at verða meiri stressaður, enn hann annars kann gerast.

ÍF–KÍ 4–1 (2–1)
1–0: Ken Bærentsen
2–0: Hanus Eliasen
2–1: Helmar Lassen
3–1: Hanus Eliasen
4–1: Høgni Zachariassen

Bíða eftir Óla

Ein dystur í 2. deild, sum sambært skránni skuldi havt verið spældur sunnudagin, varð útsettur. Talan er um uppgerðina í Gundadali millum B36 og TB. Dysturin er útsettur, og ætlanin er, at hann skal verða spældur hóskvøldið. Orsøkin til at dysturin er útsettur er tann, at Óli Johannesen er upptikin av EM undankappingardystum. Ivaleyst verður hann nakað móður hóskvøldið eftir stríðið í annaðkvøld ímóti Litava, men hóskvøldið skulu hann og tvørámenn í eldin í Gundadali.

Støðan, 2. deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 ÍF	14	10	-	3	-	1	28	10	18	33
2 TB	13	8	-	2	-	3	42	17	25	26
3 AB	14	6	-	5	-	3	27	18	9	23
4 Sumba	14	6	-	4	-	4	26	15	11	22
5 VB	14	6	-	2	-	6	27	17	10	20
6 KÍ	14	6	-	1	-	7	29	40	-11	19
7 B36	13	5	-	3	-	5	22	18	4	18
8 B71	14	4	-	2	-	8	18	20	-2	14
9 LÍF	14	4	-	1	-	9	17	38	-21	13
10 B68	14	2	-	1	-	11	8	51	-43	7